John Petersen:

# Skuldi verið trý mál og trý stig



*- Hesa ferð var eg í útgangsstøðinum áleypari, men vit avgjrødu undan dystinum, at annar av álopsmonnunum skuldi leita longur aftur á vøllin til at søkja bóltin, sigur John um leiklutin, sum hann hevði í landsdystinum*

*Mynd :Álvur Haraldsen*

**- Tað er einki at tosa um. Hasin skuldi bara rullast inn í kassan, men har kom ein bøkkur fyri, so tað var tann møguleikin. Tað var annars stórt spell, tí hatta var eitt fínt álop, har vit spæla okkum ígjøgnum verjuna, áðrenn bólturin verður sendur inn, og skoraðu vit har, so hevði dysturin verið avgjørdur, segði føroyski tvímálsskjúttin, John Petersen, millum annað, tá vit hittu hann eftir dystin**

FÓTBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*

Maðurin, sum tók útlendsku yvirskriftirnar leygardagin, var John Petersen. Eingin ivi um tað.

Við sínum báðum málum tíðliga í fyrra hálvleiki sendi hann skjálvtar gjøgnum skotska grundvøllin, og tað var eisini sjálvsagt, at útlendsku tíðindamenninir flokkaðust um hann, tá skrivandi miðlarnir loksins fingu høv at hitta leikararnar.

### Hasin skuldi inn

Tað var eisini sjónligt, at álopsmaðurin var ikki sørt errin, av at hann soleiðis hevði verið við til at skapt eina hálva sensatión, men hann ásannaði eins og liðfelagarnir, at úrslitið átti at veri enn betri hjá føroyska liðnum.

- Sjálvfylgiligt eri eg fegin um at fáa tvey mál í slíkum dysti, og sjálvandi eri eg eisini fegin um stigið, men tað hevði altso verið enn betri við trimum av hvørjum, segði hann, tá vit spurdu, hvusuu tað kendist at standa sum føroysku tvímálsskjútti.

Nógv varð annars gjørt burturúr undan dystinum, hvussu leikluturin hjá John fór at vera. Skuldi hann vera álopsmaður í einari 4-4-2, ella skuldi hann vera partur av miðvøllinum í eini 4-5-1? Nakað sum nógv hildu hóskaði seg betri til hansara spælistíl, har hann krevur at vera í sambandi við bóltin ofta.

- Hesa ferð var eg í útgangsstøðinum áleypari, men vit avgjørdu undan dystinum, at annar av álopsmonnunum skuldi leita longur aftur á vøllin til at søkja bóltin. Aloftast gjørdist tað so eg, og tað er kanska eisini náttúrligt, at so er, tí Christian Høgni og eg hava sjálvandi hvør sín spælistíl, helt hann um hetta.

Í báðum førunum, tá Føroyar skoraðu, var talan annars um bóltar inn um skotsku verjuna, har John líka sum bíðaði til í seinastu løtu við at fara inn, men hetta var tó ikki nakað, sum teir høvdu vant serstakt undir venjingunum.

- Hatta var meira slíkar støður, sum uppstanda í dystunum. Vit vita, at Jákup hevur nøkur sera góð innlegg, og í báðum førum kom bólturin somikið hart inn, at eg bara skuldi møta honum. Hasin seinni, sum kemur til vinstra beinið, hevði kanska ikki altíð farið inn, men tað riggaði so hasa ferðina, og tað var ein praktfull kensla, sigur hann.

Og um triðja møguleikan, sum John fekk, var álopsmaðurin púrasta avkláraður, tó at tað sjálvsagt var so, at hann iðraði seg eitt sindur.

- Tað er einki at tosa um. Hasin skuldi bara rullast inn í kassan, men har kom ein bøkkur fyri, so tað var tann møguleikin. Tað var annars stórt spell, tí hatta var eitt fínt álop, har vit spæla okkum ígjøgnum verjuna, áðrenn bólturin verður sendur inn, og skoraðu vit har, so hevði dysturin verið avgjørdur, segði John, sum annars ikki fekk seinasta korterið á vøllinum. Hetta tí hann fekk eina kraftiga stempling á fótin, og hóast hann kanska kundi hildið fram, so helt hann tað tá vera betri, um ein frískur maður varð settur inn á vøllin.

### Hugsar um nútíðina

Við báðum málunum leygardagin otaði John seg eitt vet longur upp á føroyska máltindin fyri landsliðsleikarar, har hann nú bert hevur Toda Jónsson (9 mál) og Una Arge (8 mál) framman fyri seg. Undan leygardagin var Jan Allan Müller trið mest skorandi føroyski landsliðsleikarin við fýra málum.

Spurdur um, hvørt tað eisini er eitt mál at taka Tosa og Una aftur á listanum, sigur John, at tað er tað kanska ikki.

- Eg hugsi fyrst og fremst um, hvør hevur skorað mest av teimum, sum spæla á liðnum í dag, sigur hann heldur speiskliga, við mest sum beinleiðis adressu til Jens Kristian Hansen, ið undan hesum dystinum hevði sama máltal, sum John Petersen.

# Nú fekk John bóltin

**Maðurin sum legði upp til føroysku málini helt eftir dysti, at nú John hevði tosað so nógv um, at hann skuldi hava bóltin, so mátti hann heldur akta**

FÓTBÓLTSTOS
*Jákup á Mørk*

Einki er at fara skeivur í, at Jákup á Borg mundi teljast millum allar bestu føroysku leikararnar á Svangaskarði leygardagin. Hann var partur av mest sum øllum tí føroyska álopsspælinum, og tað var eisini hann, sum í tveimum førum sendi bóltin innfyri, soleiðis at John Petersen kundi geva skotum meira enn ein vanliga stóran hvøkk.

### Ikki bara plássið

Tað var kanska eitt sindur merkisvert – serliga í fyrra hálvleiki – at føroyska høgra síðan fekk somikið gott pláss at arbeiða í, og Jákup ásannaði eisini eftir dystin, at hann ikki hevði roknað við at fáa somikið góðar treytir.

- Tað var soleiðis, at hasin reyðhærdi, sum spældi yvirav mær, alla tíðina søkti inn móti miðjuni, og so fekk eg sjálvandi hampuliga gott pláss at arbeiða í. Men tað skal eisini sigast, at í uppspælinum til seinna málið hevði eg ikki so gott pláss, tá eg fekk bóltin. Har mátti eg líka gera ein tunnil, áðrenn eg fekk sent bóltin inn, men tað riggaði so eisini, segði hann flennandi og heldur ósmæðin undir døgurðanum, sum leikararnir fingu eftir dystin.

- Nú var tað eisini soleiðis í vikuni, at John hevur gramt seg óført um, at hann vil hava bóltin, so har var bara eitt at gera fyri at tippa hann!



*- Við seinna málið mátti eg gera ein tunnil, áðrenn eg fekk sent innfyri, segði Jákup, sum annars var eitt sindur bilsin um, at hann fekk somikið gott pláss á vøllinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Væl rakt

- Nú veit eg ikki, hvussu dysturin fer at laga seg, men eitt er víst. Hatta hornorkestrið hjá tykkum spælir nógv betri enn landsliðið hjá okkum

*skotskur tíðindamaður undan dystinum á Svangaskarði*



# ARD helt Føroyar áttu sigurin

**Størsta týska sjónvarpsstøðin rósti føroyingum fyri teirra avrik samstundis sum teir mettu skotar at vera ússaligar**

FØROYAR–SKOTLAND
*Jóannes Hansen*

Størsta týska sjónvarpsrásin eitur ARD. Føroyar og Týskaland eru í bólki saman. Tí hevði ARD mett, at týsku hyggjararnir skuldu hava møguleika at fylgja við í dystinum á Svangaskarði, áðrenn teir seinni leygarkvøldið sóu dystin hjá Týsklandi í Litava.

Eftir tíðindafundin hittu vit teir báðar viðmerkjararnar hjá týsku rásini. Tann, sum var saman við høvuðsfrásøgumanninum, hevur fylgt bretskum fótbólti í nógv ár, og báðir vistu teir væl meiri um føroyska landsliðið, enn tað kanska kann roknast við, at tey gera úti í stóru verð.

– Eg havi ikki sæð skotar spælt so vánaliga nakrantíð fyrr. Berti Vogts segði nú á tíðindafundinum, at tað var væl betri í 2. hálvleiki, enn tað var í 1. hálvleiki. Tað kann vera, at tað var betri, men munurin var ikki stórur. Skotskur landsliðsfótbóltur er avgjørt ikki tað, sum hann áður hevur verið.

Úrslitið?

– Tað er eingin ivi um, at føroyingar skuldu havt vunnið handa dystin. Skotar vóru sera hepnir, at teir ikki fara úr Føroyum við 4–2 tapi. Tað úrslitið hevði verið ein góð mynd av gongdini og býtinum av møguleikum. Og so haldi eg, at tað er hugaligt, at føroyska liðið spældi seg til tað, sum teir fingu. Áður hava teir fyri tað mesta strítt seg til onkran javnleikin, men hesa ferð spældu teir.

Hvat siga tit so um dystin í Hanover 16. oktober?

– Eingin ivi er um, at áhugin fyri tí dystinum er øktur nógv, eftir at týskarar í dag hava sæð føroyska liðið. Um tað vóru nøkur atgongumerki eftir undan hesum dystinum, so verða tey seld nú beinanvegin.

Og úrslitið?

–Tað hevði verið skeivt at sagt annað, enn at Týskaland er stórfavorittur, og at Týskaland eigur at vinna tann dystin, og tað vænta vit eisini, at teir fara at gera. Men hesin dysturin eigur at læra týsku spælararnar, at sigurin verður ikki lættvunnin. Ivaleyst fara Rudi Völler og hansara menn at hyggja at og staðfesta, hvat teir skulu gera øðrvísi enn skotar gjørdu, var metingin hjá fryntligu týskarunum.



*Tað tóktist yvir høvur at vera hugburðurin hjá pressuni, at skotar skulu prísa sær lukkuliga fyri stigið, sum teir fingu á Svangaskarði*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Visti ikki av nøkrum

**Tað kom púrasta óvæntað á Hjalgrím Elttør, at hann skuldi vera millum teir fyrstu ellivu, men hetta var sjálvandi ein møguleiki, sum hann gleddist um**

FÓTBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*

Hjalgrím Elttør hevur bert verið knappliga eitt ár í landsliðshitanum, og leygardagin slapp hann so fyri fyrstu ferð at royna seg av álvara, tá venjarin hevði sett hann fremst í hørðu kappingini um vinstra miðvallarplássið á landsliðnum. Sjálvur hevði Hjalgrím als ikki roknað við hesum:

- Eg hevði so avgjørt ikki væntað, at eg fór at fáa møguleikan longu nú, tá eg fyri fyrstu ferð av álvara slapp at royna meg undir nýggja venjaranum, so tað var ein ótrúliga stór upplivilng, tá venjarin kortini sýndi mær somikið stórt álit, leggur ungi klaksvíkingurin fyri.

- Sat at siga, so visti eg ikki av nøkrum fyrstu dagarnar, men undir taktisku venjingini fríggjadagin sá tað út til, at eg skuldi vera millum teir fyrstu ellivu, so tá fór eg av álvara at hugsa um hetta.

Spurdur, um hetta so var í tonkunum stóran part av tíðini frá fríggjadegnum til leygardagin, svarar Hjalgrím, at tað var tað heilt avgjørt.

- Eg hugsaði um hetta at kalla alla tíðina. Vit vistu, at nógv fólk var væntandi, og vit vistu sjálvandi eisini, hvørjir mótstøðumenninir vóru, so spenningurin var sera stórur fram til dystin.

### Vónbrotin av skotum

Um sjálvan dystin sigur Hjalgrím annars, at hann hevði roknað við harðari mótstøðu.

- Ikki minst eftir javnleikin, sum Føroyar fingu seinast, var væntandi, at teir fóru at leggja nógv fyri, men teir megnaðu sjáldan at leggja okkum undir veruligt trýst.

- Tað sigur tó eisini nakað um avrikið hjá okkum, og sjálvur haldi eg, at um vit halda við sama hugburðinum og sama samanhaldinum, so er als ikki óhugsandi, at vit fara at fáa fleiri stig á kontina. Í hvussu so er kunnu vit geva mótstøðuliðunum ein skarpan gang á heimavølli, og tað er so avgjørt nakað, sum vit eiga at byggja víðari á framyvir, sigur næst yngsti maðurin í landsliðshópinum at enda.



*- Sat at siga, so visti eg ikki av nøkrum fyrstu dagarnar, men undir taktisku venjingini fríggjadagin sá tað út til, at eg skuldi vera millum teir fyrstu ellivu, so tá fór eg av álvara at hugsa um hetta, sigur Hjalgrím Elttør*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*- Teir spældu akkurát soleiðis, sum vit høvdu roknað við. Teir høvdu einar tveir ellar tríggjar, sum dugdu at spæla fótbólt, og so var restin nakrir bulldosarar, segði Julian Johnsson um skotska liðið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Einki óvæntað

**Julian Johnsson helt ikki, at skotar høvdu víst nakað serligt, og tó at hann helt úrslitið vera gott, so helt hann eisini, at tað átti at veri betri**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

Umframt teir báðar, Jens Kristian Hansen og Jens Martin Knudsen, sum eitt skifti vóru leigusveinar hjá skotska Ayr United, er Julian Johnsson einasti føroyski landsliðsleikarin, sum veruliga hevur royndir úr bretskum fótbólti, eftir at hann hevur nýtt eitt ár í Hull City, sum spælir í triðbestu ensku deildini.

### Ikki bilsin

Hetta kann tó helst ikki sammetast við lið sum Glasgow, Celtic, Everton og onnur, har skotsku landsliðsleikararnir komu úr. Í øllum førum áttu hesi feløg borgað fyri eini munandi størri góðsku, men motorurin á føroyska miðvøllinum tóktist ikki á nakran hátt vera ovfarin av, hvussu væl føroyska liðið stóð seg.

- Teir spældu akkurát soleiðis, sum vit høvdu roknað við. Teir høvdu einar tveir ellar tríggjar, sum dugdu at spæla fótbólt, og so var restin nakrir bulldosarar, sum spældu upp á kropsligu styrkina. Meira enn tað vóru teir ikki.

Um sjálvan dystin var Julian eins og so mong onnur av teirri fatan, at hóast talan var um eitt frálíkt úrslit fyri Føroyar, so átti tað at veri enn betri.

- Tað er einki at snakka um. Eg veit væl, at tú illa kanst loyva tær at vera ónøgdur, men vit eiga altso at lukka handan dystin. Vit hava stórar kjansir við bæði 2-0 og 2-1, og teir skulu vit altso skora uppá.

Føroyska miðvallarkonstellatiónin var júst hin sama, sum hon var ímóti Liktenstein. Tað vil siga við Julian og Fróða Benjaminsen mitt fyri. Ta ferðina fingu teir báðir nógvan kritik, tí føroyska spælið hekk ikki nóg væl saman, men sjálvur tykist Julian tó at taka hetta púrasta róligt.

- Tað vil altíð vera soleiðis, at tað er ymiskt frá dysti til dyst, hvussu spælið gongur, og hesa ferð haldi eg eisini sjálvur, at tað gekk rímiliga væl. Men hinvegin – um Fróði og eg fáa harðan kritikk, tá liðið vinnur 3-1, so havi eg heldur einki ímóti tí!